# FAMILJU-FYRITØKA Í SEKSTI ÁR

**... í 1987 helt eg meg sígga møguleikar í at taka virksemið uppaftur...**
KARL JÓHAN OLSEN



*Umsetningurin hjá Snælduni stavar ávikavist frá tógvframleiðslu, binding, seyming og sølu av pløggum*

**FRAMLEIÐSLA** Umsetningurin hjá Snælduni á Strondum kann býtast í tveir umleið líka stórar helmingar, harav annar stavar frá sølu av tógvi – og hin frá bundnum pløggum

Vilmund Jacobsen

Í meiri enn seksti ár hevur spuna- og tøtingarvirkið Snældan verið á Strondum – og ikki bara á Strondum, men eisini á somu adressu øll árini. Adressan er nevniliga Langanes 6. Har byrjaði virksemið, og tað er framvegis í hesum umhvørvi, at fyritøkan hevur bygt seg út til tað, hon er í dag.

Tað var abbi verandi stjóra og eigara, Karl Jóhan Olsen, sum hevði sama navn, ið legði lunnar undir Snælduna. Hann var møbilsnikkari og hevði verkstað, men byrjaði longu í 1949 at spinna tógv úr ull, sum fólk komu við.

## Danskur virkisleiðari

Karl Jóhan, sum soleiðis er triðja ættarlið eftir hin gamla, sigur, at abbin keypti sær spinnimaskinur og aðrar maskinur úr Danmark, sum eru neyðugar í framleiðslu úr ull.

- Ein dani kom upp higar, tá maskinurnar komu. Hann fekk alt upp at koyra og var virkisleiðari á virkinum hjá abba mínum í nøkur ár.

Gjøgnum árini er Snældan útbygd við meira plássi og betri maskinum.

- Ein útbygging var í 1957 og ein í 1968, og við seinnu útbyggingina varð bygt leyst úr táverandi virki, men beint við síðurnar av.

Karl Jóhan sigur, at brúktar og betri maskinur eru keypar, sum tíðin er gingin.

- Slíkar maskinur eru ógvuliga dýrar at keypa, men hava langa livitíð. Tí verða tær ofta keyptar brúktar, leggur hann aftrat.

## Steðgur í nøkur ár

Snældan á Strondum hevur koyrt øll árini fram til dagin í dag undantikið í eini 2-3 ár í áttatiárunum.

Eftir abba Karl Jóhan, tók pápi hansara Oddmar yvir. Spuna-og tøtingarvirkið á Langanesi 6 hevur soleiðis verið og er framvegis ein fyritøka, sum hevur verið í familjuni øll árini síðan byrjan.

- Sjálvur byrjaði eg at arbeiða á Snælduni sum 17 ára gamal í 1970, og tað var eg, sum í seinna helmingi av áttatiárunum byrjaði virksemið aftur, eftir at tað hevði ligið stilt.

Árini, meðan steðgur var í framleiðsluni á Snælduni, fekst Karl Jóhan við annað arbeiði.

- Í 1987 helt eg meg sígga møguleikar í at taka virksemið uppaftur, og eg setti mær fyri at fáa gongd á aftur. Síðan tá hevur Snældan verið í gongd øll árini fram til dagin í dag, sigur stjórin, sum eisini eigur allan partapeningin í felagnum aftanfyri spuna-og tøtingarvirksemið á Strondum.



*Tað var abbi Karl Jóhan Olsen við sama navni, sum legði lunnar undir Snælduna á Strondum í 1949. Eftir steðg í framleiðsluni í eini 2-3 ár í seinnu helvt av áttatiárunum, tók Karl Jóhan um stýrisvølin og hevur rikið fyritøkuna síðan*

## Framleiðslan broytist

Í stuttum kann sigast um framleiðsluna á Snælduni, at hon hevur flutt seg síðan byrjan.

- Tey fyrstu árini lótu fólk sína ull inn at spinna. Ullin varð flokkað og virkað til tógv á virkinum. Síðan fingu tey, sum høvdu latið ullina, nøgdina aftur sum tógv við einum svinni upp á eini 10%.

Karl Jóhan sigur, at soleiðis